

u prestarnir vóru til gudstænastuna í Kvívík. Her verður bøn hildin yvir nýggja starvsfelaga teirra



Ein eldri kvinna úr familjuni hjá Theodori heilsar uppá nýggja biskupin



Bjarni Bæk heilsar Theodori



- Móttøkan í Kvívík var hjartalig, sigur Theodor

# rin fær úr at gera



Theodor fær úr at gera hesar komandi tríggjar mánaðirnar, bæði við vanligar gudstænastur sunnudagar og við føstugudstænasturnar kring landið

*Nú er veitslan liðug, og eg fari at fyrireika meg til næstu uppgávurnar*



Brøður hittast – Dagfinn Olsen, búsitandi í Vági heilsar nýggja presti



Theodor hevur eitt skifti starvast sum blaðmaður á Sosialinum. Blaðstjórin. Jan Müller var sjálvandi við til hátíðarligu løtuna í Kvívík



Móðir nýggja prestin heilsar uppá sonin

Christensen, og skulu hesi trý nú røkja kirkjufólkið í teimum átta kirkjunum í prestagjaldinum.

### Ymsar tænastur

Hóast talan er um fyrsta arbeiðsdag hansara í morgun, veit Theodor longu um fleiri kirkjuligar tænastur, ið liggja fyri framman.

Eitt brúdleyp og ein barnadópur eru í øllum førum á skránni, og so plaga kvívíkingar eisini at skipa fyri eini bygdalegu eina ferð um árið. Har plagar prestur at vera við.

Og so skal prestur eisini flyta inn í prestagarðin á Kirkjuteigi í Kvívík. Hetta verður væntandi gjørt í dag ella í morgin.

- Sunnukvøldið hevði eg familjuna í prestagarðinum, har vit hugnaðu okkum saman við práti og einum kaffimunni.

- Men nú er festin liðug, og eg fari at fyrireika meg til næstu uppgávurnar, sigur Theodor við einum brosi.